# Sandoyggin gloymd

SÓLVIT SIMONSEN



Fyri tíð síðani varð samtykt á tingi, at undirsjóvartunnilin skuldi gerast millum Streymoy og Sandoy – í 2009 og annars varð meint, at tað vórðu ov góðar tíðir at fara undir slít stórarbeiðir. Tað riggað betur at seta slík arbeiðir ígongd í ringum tíðum – so tað skuldi nú verið lag á manni at fari undir hettar arbeiðið, men nú rura teir okkum við at tunnilin skal byrja einaferð í 2011.

- So inntil tað tíð syngja vit bara:

Rura rura rilla. Og táið so 2011 kemur, eru vónandi betri tíðir aftur, og tá kann man ikki gera íløgur í Sandoynna – so syngur man bara restina av ørindinum: - Mamma tín eitur Billa. Pápi tín er ein góður maður. Stundum betur kann illa.

Tað er ikki smávegis sum Suðuroyggin skal hjálpast og alt gott um tað, eg unni Suðuroynni alt gott, men táið fari verður suðureftir, mátti onkur verið sum fekk eyga á Sandoynna. Vit hava eitt virkið her á Sandi sum man við sorg má bara síggja standa og falla. Takrennurnar gignar sundur so rennur niðureftir á ómáløðum klædningi sum er grønur av slýggið. Virkisbygningurin forferst fyri hvønn dag.

Onkur tingmaður vildi geva suðuroyingum ein posa við 40 mió. krónum og aðrir vilja flyta øll almenn skip suður til Suðuroynna og ómøguligan er tað rætt, men vit liggja jú á leiðini, so okkurt smávegis mátti verið til Sandoynna.

Tá ið fíggjarlógin var fyri, blivu tunlar settir í gongd bæði sunnanfyri og norðanfyri, men í Dali – í Dalsbergi verða tey bumbaði undir av gróti úr Dalsberginum og tað sama í Sandslíð.

Tað gav at bíta, tá fíggjarlógin var kunngjørd í fjølmiðlanum. Tá var ein millión til Sandoynna. Men so frætt av skomm var álíkavæl í teimum, at teir tóku 7 milliónirnar sum vórðu játtar til Skúvoynna og skoyttu saman við Sandoyar Sýslu – soleiðis, at teir fingu tað at ljóða til 8 milliónir krónur – til Sandoyar Sýslu.

Tað er strævið, nú teir so væl kláraðu at fáa øll tingfólkini inni á meginøkinum, at vera einsamallur tingmaður í Sandoynni, men um Tjóðveldi ikki var fyrisprákari at trýsta Sandoynna niður í dýpið – so áttu vit her, at havt okkara lokala tjóðvelidismann inni á Tingi, tí sjálvt um formaðurin tjóðvelidsfloksins ferðast títt millum Føroyar og Danmark við donskum ferðaseðli og danskari løn – so ber væl til, at halda eykmanni hansara í Sandoynni úti frá tí politiska vøllinum. Men hann er jú úr Sandoynni!.

Tjóðveldi má væl ikki trúgva at sandoyingar eru blindir og ikki fylgja væl við.

# Kveikjandi arbeiðsmarknaður í truplum tíðum

BERGTÓRA H. JOENSEN



Væleydnaða Job Match vísti, at fleiri føroyingar fegnir fluttu heim, um abeiðuppgávurnar vóru nóg áhugaverdar. Arbeiðsgevararnir – ikki minst vinnan - kýttu seg at greiða frá spennandi verkætlanum og starvsmøguleikum í Føroyum.

Kanningin hjá Norðuratlantsbólkinum um, hví føroyingar velja at búseta seg í Danmark vísti tað sama. Um størvini vóru nóg spennandi, vildu eisini tey framsóknu fegin heim aftur til Føroyar.

Loksins høvdu vit eina greiða mynd av, hvat skuldi til, til tess at fáa føroyingar heimaftur.

**Lagamanni hjá politikarum**

Kann ein politikari ynskja sær meir enn so feska og ítøkiliga vitan frá útisetunum um, hvussu teir fáast heimaftur? Upplagt at fara til verka og skipa arbeiðsmarknaðin, so at Føroyar vórðu valdar 'til'. Undir fíggjarlógarviðgerðini hoyrdu vit tingfólk aftur og aftur endurtaka, hvussu týdningarmikið tað var at hava byggivirksemi í øllum landinum, tí stígur var væntandi. Í so máta vóru flestøll samd.

**Útlendingar ella føroyingar?**

Einans 6 vikur eru lidnar, síðan vit øll tvíhildu um hetta. Men nú fara útlendingar avstað við føroyskari milliónaverkætlan fyri nøsini á føroyingum, meðan arbeiðsloysi er vaksandi (hóast tað enn er lágt). Um hetta ikki skríggjar til himmals, skilji eg púrt einki. Meini so við, ein høvuðsgrundgeving fyri einum so ovurhonds stórum halli á fíggjarlógini – meir enn hálvari milliard – var at fyribyrgja arbeiðsloysi.

**Ársins leiðaradagur**

Fyri stuttum var ársins leiðaradagur. Avbera læruríkt at hoyra umboð fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum og vinnulívsfólk siga sína hugsan um politisku raðfestingarnar og okkara arbeiði sum heild. Ikki sørt, at eg hitnaði um oyruni!

Fyrilestrarhaldari við dyggum royndum í byggivinnuni segði í síni røðu, at útlendingar uttanlands stundum tóktust at hava størri álit á føroyskum entreprenørum og ráðgevandi virkjum enn føroyskir myndugleikar. Dømini vóru eitt nú orðingar, sum høvdu verið í almenna rúminum, um at føroyingar ikki dugdu at byggja eina ítróttarhøll ella at hava eftirlit við prestagørðum, sum í roynd og veru ikki vóru annað enn gomul sethús. Eisini varð nógv sagt um allar tunlaverkætlaninar hjá sitandi samgongu, men tað lati eg liggja á hesum sinni.

**Hvat er at missa?**

Um talan er um verkætlanina á landssjúkrahúsinum varð tikið av tilboði sum var 6 milliónir bíligari enn føroyskt tilboð. Fíggjarmálaráðharrin segði herfyri á tingi, at vit máttu hava í huga, hvussu vit fingu mest fyri peningin. Nakað er sjálvsagt um tað.

Mær tykir tó ikki, at roknistykkið er so einfalt. Umframt, at fleiri føroyingar gerast arbeiðsleysir og fáa ALS heldur enn eina góða løn, starvsfelagar og ein intaktan arbeiðssamleika er tað bert ein partur. Um verkætlaninar ferð eftir ferð fara av føroyskum hondum fáa føroysku entreprenørar og ráðgevar ikki tær royndir og menning sum er alneyðug. Í ringasta føri kann byggivnnan fara fyri bakka. Samstundis kann neyvan væntast, at serliga nógvir timburmenn, elektrikarar, húsasmiðir ella múrarar verða útbúnir. Tí hvar skulu teir læra, um einki arbeiði er? Verkfrøðingar, arkitektar og allir entreprenørar áttu júst í hesum døgum at kent vælvildina, sum jú var tingsins vilji.

Men hetta vóru kanska bara føgur orð?

**Hvat gera vit nú?**

Vit mugu vísa byggivinnuni, at vit hava álit á henni og at ætlanin er, at peningurin til byggivirksemi eisini skal fara til føroyska arbeiðsmegi. Sjálvandi skulu útlendsk feløg eisini kunna bjóða og prísirnir vera kappingarførir - men kappingin skal vera fair. Saman við vinnuni og pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, má bera til at finna eina loysn, har allir partar hava ein góðan smakk í munninum. Ein loysn har: lønin er sambært føroyskum sáttmálum og kappingin er rættvís.

# Betri er bøtandi hond enn spillandi tunga

JOHN JOHANNESSEN
Form. Javnaðarfl. á tingi



**Tað er veruliga fallið Tjóðveldi og Dimmalætting fyri bróstið, at eg á felags fundi í Helsinki týsdagin ímillum politisku leiðslurnar í norðurlendsku Javnaðarflokkunum nýtti høvi at tosa við norska forsætisráðharran um føroysku ónøgdina við býti av makreli ímillum Noreg og Føroyar**

Eingin hevur meira enn Tjóðveldi við ógvusligum vendingum víst á, at býtið av makreli ímillum Noreg og Føroyar ikki er nøktandi.

Rætt er. Avtalan er ikki nøktandi. Tað vístu vit sum ein samd uttanlandsnevnd á í sambandi við ráðførðslu um málið. Tí av samlaðu kvotuni uppá 36 túsund tons, sum strandalondini hava ásett norðan fyri 62 stig, fær Noreg 30 túsund tons og Føroyar 6 túsund tons.

Harumframt hevur Noreg brúkt eina rættiliga óvanliga framferð móti Føroyum í hesum máli.

So er spurningurin, um føroyingar bert sum vanligt skulu lata standa til, yppa øksl og annars leika í heima í Føroyum, um at høvd her heima skulu rulla og annað mangt.

**Góð ráð ímillum floksfelagar**

Týsdagin var eg á fundi í Fólksins Húsi í Helsinki í Finnlandi. Politisku leiðslurnar í Javnaðarflokkunum og fakrørslunum í øllum Norðurlondum høvdu sett hvørjum øðrum stevnu, sum vit regluliga gera einaferð um árið. Ikki upp á landsins rokning, men við fígging úr flokskassanum.

Har var eg í stovu saman við millum øðrum norska forsætisráðharranum, Jens Stoltenberg, í ein heilan dag. Vit umrøddu millum annað felags avbjóðingar, ið standa fyri framman, nú fíggjarkreppan er ein ítøkilig hóttan ímóti vælferðini – serliga hjá teimum veikastu. Samstundis varð nógv tosað um týdningin av samanhaldi og samhaldsfesti ímillum norðurlendsku tjóðirnar í hesum trongu tíðum.

Júst í sambandi við hetta, hevði verið løgi, um eg ikki lat nøkur orð falla til floksfelaga mín í Noreg, um framferðina hjá Noreg ímóti Føroyum í Fiskivinnusamráðingunum.

Men fyri ikki at gera nakað skeivt mótvegis landsstýrinum, valdi eg fyrst at seta meg í samband við landsstýrið um hetta mál. Hagani fekk eg boð um, at tað var full undirtøka fyri, at eg royndi at gera norska forsætisráðharran greiðan við føroysku ónøgdina.

Í einum kaffisteðgi fingu Jens Stoltenberg og eg høvi at tosa saman um hesi viðurskifti. Eg greiddi honum frá føroysku ónøgdini, og um hvussu óvanliga, ið samráðingarnar vóru farnar fram. Hann lovaði at tosa við fiskimálaráðharran hjá sær um málið.

Tað er ikki vist, at hetta bøtir um makrelavtaluna. Men norski forsætisráðharrin er nú í øllum førum greiður um, at floksfelagar hansara í Føroyum og føroyingar annars halda, at Noreg átti at víst Føroyum størri samhaldsfesti og virðing. Og kanska var tað eitt úrslit av hesum, ið vit sóu longu hósdagin, tá norðmenn góvu tilsøgn um at lata føroyingar fiska 30 túsund tons meira av sild í norskum sjógvi.

**Spillandi tungan**

Tjóðveldi og Dimmalætting tykjast vera ógvuliga í øðini um, at norski forsætisráðharrin og eg hava tosað saman um hesi viðurskifti. Tað verða nýtt orð sum skeiklan av valdsbýti, viknan av samráðingarstøðu hjá landsstýrinum, dukkuførarar og annað mangt. Enntá sigur Tjóðveldi, at eg nú skal hava gjørt málið til ein spurning ímillum løggevandi valdið í Føroyum og útinnandi valdið í Noreg, og at hetta er ímóti øllum reglum.

Eg lesi hetta soleiðis, at tað fyri summi hevur størri týdning at skapa rumbul og rópa upp um ónøgd, heldur enn at gera nakað við trupulleikarnar.

Og tá tosað verður um at blanda leiklutirnar saman, so kann eg ikki annað enn hugsa um, tá Tjóðveldi ferð eftir ferð dregur innanhýsis politiskar ósemjur í Føroyum niður á Fólkating og enntá ger tær til mál ímillum donsku stjórnina og Tjóðveldi á Fólkatingi.

At velja leiklutin sum spillandi tungan er eitt frælst val. Men tað er ikki serliga uppbyggjandi. Tað er hóast alt betri, at royna at gera sítt til at vera bøtandi hondin, har man hevur møguleikan.